# ímóti Brandi

Diamond, ið hevur haft fleiri løg á listunum her í Svøríki.

Hesi trý meta nógv hava størstan møguleika at koma til Globen, men nevna samstundis nøvn sum Velvet og Brandur, sum tvey sum kunnu yvirraska og koma víðari.

### Vest og myrkar buksir

Tað, sum er minst líka týdningarmikið sum lagið, er hvussu tey luttakandi klára seg á pallinum. Klæðir, hár og koreografi telur nógv, tá sjónvarpshyggjarin skal velja sær sang at stemma uppá.

Brandur hevur slatrað fyri mær, at hansara klæði eru einkul, ein kowboyinspireraður vestur, myrkar buksir og bláar skógvar! Vesturin er keyptur á second-hand í Stockholm.

Um tað er ein vinnandi klædningur, fáa vit so at vita leygarkvøldið.

**Kringvarp Føroya sendir svenska Grand Prixið við Brandur Enni leygarkvøldið kl. 19.00**

5

***Michael Michailoff***

## That's Love

Michael Michailoff er føddur og uppvaksin í Svøríki. Hann skrivar nógvan tónleik, og var við i kappingini Fame Factory fyri nøkrum árum síðani. 2004 kom hansara fyrsta fløga út "In God I Trust". Tá Michael ikki fæst við tónleik er tað fótbóltur, ið er størsti áhugin. Hetta er fyrstu ferð hann luttekur í Grand Prix, og lagið hjá honum verður lýst sum ein pop-rock-sangur við brittiskum íblástri.

6

***Amy Diamond***

## Thank You

Amy Diamond gjørdist kend í Svøríki, tá hon sum einans 13 ára gomul toppaði listarnar við hittinum "What's in it for me". Amy er fødd í Svøríki, men hevur búð í Onglandi stóran part av uppvøkstrinum. Hon gongur nú í níggjunda flokki og hevur leingi haft hug at veri við í Grand Prix, men í ár er fyrstu ferð hon er nóg gomul til tess. Sangurin hjá Amy er, sum teir sangir hon áður hevur sungið, lívligur við eitt sindur av old-school-kenslum.

7

***Suzzie Tapper***

## Visst finns mirakel

Sangarindan og høvundin Suzzie Tapper, hevur fyrr luttikið í Grand Prix við sangum hon hevur skriva, men hetta er fyrstu ferð hon sjálv stendur á pallinum. Hon hevði eitt stórt hitt í Svøríki fyri nøkrum árum síðani, men er ikki serliga kend her. Sangurin hon luttekur við í ár er vakur og róligur við persónligum teksti.

8

***Christer Sjögren***

## I Love Europe

Christer Sjøgren kenna tey flestu sum forsangarin í bólkinum Vikingarna. Hóast at hann hevur staðið á pallið síðani byrjanina av 70-unum, so er hetta fyrstu ferð hann er við í Grand Prix. Hann hevur seinastu árini veri sjónleikari í ymiskum filmum og musikalum, og givið fløgur við andaligum tónleiki út. Sangurin hann kappast við er ein typiskur svenskur Grand Prix sangur við heilum fýra tónahækkingum.







